# Heidi Hauge væl nøgd og væl fagnað



*Nógv vóru og lurtaðu eftir Heidi Hauge í vikuskiftinum og norska countrydrotningin varð væl fagnað*
*Mynd: Jens K. Vang*





*Countryfjepparar fingu country fyri allan peningin, tá Heidi Hauge og manning vóru á pallinum*
*Mynd: Jens K. Vang*



*Heidi Hauge og manningin koma fegin aftur til Føroya, fáa tey tilboðið*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Countrydrotningin á okkara leiðum eitur uttan iva Heidi Hauge. Síðani hon fyri stuttum kom fram, hevur hon nátt ovastu tónatindar. Um vikuskiftið vitjaði hon okkara sólrandaðu tindar og klettar og áhugin og fagnaðurin var stórur**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Norska countrysangarinnan Heidi Hauge vitjaði um vikuskiftið í Føroyum saman við ljómliði sínum.

Áhugin var stórur beinanvegin tað hoyrdist, at hon skuldi hava konsertir í Føroyum. Atgongumerkini vórðu seld í forsølu, sum sjáldan áður.

## Countrybólkurin og Driv

Og tað vísti seg eisini, at føroyingar samdust um hesa countrydrotning. Í Havn leitaðu 1500 fólk sær í dans og á Tvøroyri eisini 800 ella 900 fólk.

Heidi Hauge var væl nøgd og sera væl fagnað. Fyrireikararnir siga, at hon hevði firvaldar í búkin áðrenn fyrstu framførsluna. Men Heidi Hage varð væl móttikin og bilsin var hon um góðu áhoyrarafjøldina, ið dansaði nógv og hugnaði sær óført. Og bardaga ella líknandi sást einki til.

Í Havn kom Countrybólkurin úr Klaksvík eisin á pall. Á Tvøroyri kom bólkurin Driv úr Havn á pall (nakrir av manningini eru suðuroyingar, blðm). Føroysku bólkarnir fingu eisini undanvind og sera gott skoðmál frá áhoyrarunum.

## Kemur fegin aftur

Heidi Hauge er fegin um vitjanina í Føroyum. Hon hevur sagt seg vera áhugaða at koma aftur eina aðruferð, skuldi tað komið upp á tal.

Bert eitt var hon kedd av á ferðini. Hon hevði bert eini 100 fløgur við sær til Føroya, og tað var, sum vituligt er, alt ov lítið og var burtur eftir lítlari løtu. Men kemur hon aftur, so verður hetta mistak ikki at gjørt uppaftur.

Norska countrydrotningin fór sera væl nøgd av landinum og eftir gingu vælnøgdir fjepparar í hópatali, ið fingu eitt ógloymandi minni.







8 dagar í London

**Ramada Jarvis Hotel*** Superior**
Marylbone, 1B Harwood Row, NW1 6SE

Fyri hvønn í dupultkamari **Kr. 5514**
Í einakamari **Kr. 7325**

Hotellið liggur beint við Baker Street Tokstøðina, Madam Tussaud og Planetarium

**Queens Park Hotel*****
Bayswater, 48 Queensborough Terrace, W2 3SJ

Fyri hvønn í dupultkamari **Kr. 5278**
Í einakamari **Kr. 7115**
Í trímanskamari **Kr. 5173**

Hotellið liggur í Bayswater býarpartinum miðsskeiðis í London.

**Íroknað ferðina er:** Flogferð við Atlantic Airways beinleiðis til London/Stansted. 8 nætur á hotelli við morgunmati, og ferðaavgjøld.

Útferðir í og umkring London - Siglitúrar á Thames - London Sightseeing túrar - Musicals - og annað undirhald sum Beefeater, London Showboat og mangt annað.
Kann bíleggjast saman við ferðini.

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo